# Reinar áir í Hesti

**Úti í Hesti fáa tey nú nýggja, skipaða kloakkleiðing, felags reinsiverk, nýggj gøtuljós, og vegir og tún verða asfalterað av nýggjum**

HESTUR



*Í morgin verður nýggja kloakkskipanin alment handað býtáðnum á samkomu í bygdarstovuni í Hesti*

Tað er p/f J&K Contractors, ið hevur staðið fyri kloakkarbeiðinum, og P/F Sofus M. Jakobsen hevur staðið fyri tí ráðgevandi partinum av arbeiðinum. Verkið verður alment avhendað til formannin í teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, Marin Katrinu Frýdal, í morgin, hósdagin 12.00 í bygdarstovuni í Hesti.

Tað er kommununnar ábyrgd, at spillvatnsleiðingar eru umhvørvisliga í lagi. Við kommunusamanleggingina varð avgjørt, at hestfólk skuldu fáa nýggja, skipaða kloakkleiðing og reinsiverk. Nú, hálvtannað ár er farið síðani samanleggingina, er hetta málið nátt.

Í hesum sambandi hevur bygdin eisini fingið nýggj gøtuljós og vegir og tún eru asfalterað av nýggjum. Hesum arbeiðinum hava starvsfólk hjá Teknisku deild kommununnar tikið sær av.

Tórshavnar kommuna raðfestir trivnaðin og røkt høgt, og ein fortreyt fyri hesum er eitt reint umhvørvi. Fyri eina framkomna kommunu

QuickSilver og LodeStar gummibátar á goymslu




Prísur frá 7.990 kr

STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo




Skrivstovulærlingur

Vit hava eitt lærupláss leyst at søkja.

Vit kunnu bjóða eitt læruplás, har tú lærir allar uppgávur í eini fyrisiting. Tín læra kemur millum annað at umfata: Debitorbókhald, kreditorbókhald, tolling, postavgreiðsla og allar tær uppgávur, sum annars eru á eini vanligari skrivstovu.

Umsøkjarar skulu hava staðið FHS-prógv, HH ella líknandi miðnámsútbúgving.

Spurningar um starvið, kunnu setast Dan Olsen, fíggjarstjóra, á telefonnummar 313041 ella á telduposti dan@sms.fo

Skrivlig umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2006. Send umsóknina til: SMS, att. Dan Olsen, Postboks 1059, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til dan@sms.fo.

SMS
ein býlingur í Havn

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið í summarfrítíðini

Avmarkað avgreiðsla í summarfrítíðini

Almanna- og heilsumálaráðið fer í summarfrítíðini frá

17. juli - 4. august 2006

bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.

Hetta tíðarskeið ber til at fáa fatur á Almanna- og heilsumálaráðnum hvønn gerandisdag millum kl. 10:00 - 12:00 á fartelefon 214028. Avgreiðslan virkar aftur sum vanligt frá mánadegnum 7. august 2006.

Almanna- og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn
Tel 30 40 50
Fax 30 40 45
ahr@ahr.fo
www.ahr.fo

Vit draga eina línu | Vit seta skynsemi í hásæti | Vit vilja vita | Vit bróta slóð

SUNSET Boulevard

Starvsfólk

TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

Fullatíð

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 17 ár og eldri til at arbeiða fullatíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 08.00 og 21.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.